# Opið aftur í Gøtudali

*Fyrrapartin leygardagin lat Shell-støðin í Gøtudali alment uppaftur. Støðin er umvæld og innan er hon gjørd heilt av nýggjum. Støðin er nú ein »Select«handil eins og vanligt er við slíkum støðum í Danmark*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað var ikki eiti á fólkamongd, sum hevði leitað sær inn í Gøtudal fyrrapartin leygardagin, tá Shellstøðin í bygdini alment lat uppaftur eftir høvuðsumvælingina, sum er gjørd.

Nýggjar oljupumpur eru settar upp og kortautomatin syrgir fyri, at tað nú eisini ber til at fylla sær olju og bensin á bilin á náttartíð.

Innan er handilin fullkomiliga broyttur. Alt er nýtt og øðrvísi enn tað var frammanundan.

Eisini vøruúrvalið er broytt og tað sæst millum annað best við, at tað nú ber til at keypa nýbakað hvønn dag.

Talan er um hálvlidnar vørur, sum fyritøkan keypir frá stórbakarum úr Danmark og sum síðani vera liðugtgjørdar í Gøtudali og tað er hent í eini bygd, sum ikki hevur bakara.






*Tað ringasta er við at hasa av og nú ber til at sleppa fram at diskinum at fáa sær ein bita. Sera nógv fólk var í Gøtudali leygardagin*

**Mynd: Jonhard Hammer**

### Selecthandil

Høvuðsbroytingin innan er tann, at tað, sum fyrr var at meta sum ein kiosk, nú mest líkist einum handli.

Hákun Djurhuus, stjóri á Shell sigur, at teir hava brúkt sama modell, sum verður brúkt á størri støðunum í Danmark.

– Allar flestu støðirnar niðri eru gjørdar sum henda. Her eru kølidiskar, sum syrgja fyri, at vørurnar alla tíðina standa kalt og gott.

*Men fara vit at síggja fleiri slíkar støðir í Føroyum?*

– Tað er ikki vist. Tað, sum hevur týdning er, um kundagrundarlagið er til staðar. Henda støðin liggur soleiðis fyri, at tað kemur nógv fólk á gátt, men soleiðis er ikki alla staðni í landinum, sigur Hákun Djurhuus.

*Hvar aðrastaðni er møguleiki fyri slíkum handlum í Føroyum?*

– Við Ringvegin í Havn er møguligt, tí tann støðin hevur eisini nógvar kundar, men tað er einki avgjørt um tað enn, sigur Hákun Djurhuus.

### Stórur áhugi

Sum sagt var nógv fólk komið saman í Gøtudali leygardagin og tey sluppu at hoyra kórsang áðrenn bygdaráðsformaðurin í Gøtu, Jógvan Gregersen segði nøkur orð.

Aftaná fór øll rúgvan innar har Shell beyð teimum at leska sær við einum bita av onkrum góðum við einum kaffimunni ella onkrum øðrum góðum afturvið.

Børnini vórðu heldur ikki gloymd henda dagin. Tey fingu ballónir og tilíkt.

Og verður undirtøkan hjá støðini framyvir eins góð og hon var leygardagin, so verður trongligt í Gøtudali.

## Roykja óhugnaliga illa

ÓLAVUR Í BEITI

– Fyribyrgingarráðið skal hava til uppgávu í serligan mun at tryggja eitt fyribyrgjandi arbeiði við útliti til ágóða av arbeiðinum nógv ár seinni. Fyribyrgingarráðið skal tí mannast við fólki, sum ikki bert fara eftir tí, sum er uppi í tíðini, men heldur teimum veruligu trupulleikunum, t.d. tubbaksroyking og fita. T.d. kann nevnast, at kanningar gjøgnum nógv ár millum næmingar í 9. flokki í fleiri europeiskum londum vísa, at føroyskir næmingar roykja óhugnaliga nógv samanborið við næmingar í hinum londunum.

– Dentur má tí í nógv størri mun enn higartil verða lagdur á at mótvirka teimum orsøkum, ið finnast í samfelag okkara, sum elva til vælferðarsjúkurnar, soleiðis at fingin verður til vega ein betri javnvág millum okkum menniskju og umhvørvið.

– Fingu vit eitt gott umhvørvi í mun til tað, ið vit nú hava, vildi hetta óivað í stóran mun minka um teir nógvu tilburðir av hjarta- og æðrasjúku, krabbameini, ferðsluvanlukkum og sálarligum sjúkum. Hesar sjúkur eru sum nevnt tær altvaldandi í samfelagi okkara í dag. Heilsuverkið er í stóran mun hjálparleyst, tá ið talan er um at grøða hesar vælferðarsjúkur, eru tær fyrst komnar, sigur Helena Dam á Neystabø m.a. í viðmerkingunum til uppskotið um Fyribyrgingarráð.

Viðvíkjandi kostnaðinum, sigur heilsumálaráðharrin, at ikki ber til at siga við vissu, hvussu stórur kostnaðurin av virki fyribyrgingarráðsins verður, fyrrenn ráðið er valt og hevur gjørt sær arbeiðsætlan.

– Játtanin eftir galdandi skipan til tey trý verandi ráðini er 1,258 mió. kr. Nakað kann sparast við at leggja ráðini saman, men havast skal í huga, at játtanin ikki eigur at verða skerd, tí at virksemið hjá fyribyrgingarráðnum fevnir um alt almanna- og heilsuøkið, og ikki bert um ávísar sjúkur, soleiðis sum núverandi skipan ger.

– Ætlanin við hesum lógaruppskoti er, at skipa eitt fyribyrgingarráð, sum skal koma í staðin fyri hini trý ráðini, men sum eisini skal taka sær av øðrum heilsutrupulleikum. Her verður t.d. hugsað um trupulleikar, sum standast av skeivum kostvanum, vantandi likamsvenjing o.s.fr. Fyribyrgingarráðið skal sostatt vera eitt altfevnandi ráð, sum tekur sær av øllum teimum heilsutrupulleikum, sum koma fyri dagin, sigur Helena Dam á Neystabø m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.



## Óli Breckmann tosaði um Baden Powel

– Vit skulu læra av hugsjónum Baden Powels.

Hesi vóru ráðini hjá Óla Breckmann, løgtings- og fólkatingsmanni, sum helt grækarismessurøðuni í Havn.

At Óli Breckamann hevur verið skóti var eyðsæð, og hann tók støðið í skótaarbeiðinum, sum Baden Powel fór undir saman við 25 skótum í 1907. Í dag kann talið á skótum faldast við 25 millíónum, segði Óli Breckmann m. a.

Eftir skránni skuldi Bjarni Bæk, dómpróstur halda røðuna, men hann hevði fingið forfall, og tí varð Óli Breckmann biðin í hansara stað.

Nógv fólk høvdu leitað sær oman á Vaglið í góðveðrinum, sum helt sær ta løtuna, hátíðarhaldið vardi.



*Óli Breckmann, løgtings- og fólkatingsmaður heldur grækarismessurøðuna í Havn*



# Almenna lønarútgjaldingin vaks 16,8%

*Í 1989 vóru lønarútgjaldingarnar 4433 mió. kr. og í 1999 — 4434 mió. kr., og samstundis verður tosað um, at sama ferð er komin á búskapin, sum var í 80-unum, stendur m.a. at lesa í lønaryvirliti frá Vinnuhúsinum*

ÓLAVUR Í BEITI




– Nú vit eru farin um eitt túsundáraskiftið er áhugavert at líta aftur um bak, hvussu er gingist teimum ymisku vinnugreinunum, og vit hava valt at nýta lønarútgjaldingarnar sum ein indikator fyri framleiðsluna. Tað er trupult at nýta lønargjaldingarnar sum ein indikator fyri hvussu einstakar vinnugreinir hava tað, tí framgongdin verður gjørd upp í útreiðslum. Tað eru vinnugreinir, sum hava klára seg sera væl, og økt nógv um framleiðsluna, men lítið um lønarútgjaldingarnar, verður sagt í skrivi frá Vinnuhúsinum.

Sambært hesum yvirlitinum hjá Vinnuhúsinum, so er lítil og eingin munur á lønarútgjaldingunum í 1999 og 1989. Í 1989 vóru lønarútgjaldingarnar 4433 mió. kr. og í 1999 vóru tær 4434 mió. kr. Størsta lønarútgjaldingin er í fiskivinnuni. Parturin hjá fiskivinnuni av tí samlaðu lønarútgjaldingunum er farin úr 14,9% í 1989 upp í 16,9% í 1999 (í 1998 -19,4%). Framgongdin síðani 1989 hevur tí verið týðilig, og hetta er samstundis sum hesin bólkurin hevur fingið ein týðiligan skattalætta, sum restin av Føroya fólki ikki hevur fingið, skrivar Vinnuhúsið.

### 668 mió. kr

Yvirlitið vísir eisini, hvussu nógv prosent, tær ymisku vinnugreinirnar hava flutt seg í mun til samlaðu lønarútgjaldingarnar í 1989 og 1999. Almenna fyrisiting hevur heili 2,2% størri part av lønarútgjaldingunum í 1999 í mun til 1989. Parturin hjá almennu fyrisitingini var í 1989 — 12,9% av teimum samlaðu lønarútgjaldingunum, og 15,1% í 1999. Í tølum svarar hetta til 572 mió.kr. í 1989 og 668 mió. kr. í 1999 ella ein vøkstur á 16,8%. Tað er trupult at siga, hvat orsøkin er til henda stóra vøkstur innan almennari fyrisiting annað enn, at fleiri fólk er sett í starv, skrivar Vinnuhúsið.

Um almenna fyrisitingin, undirvísingar-, heilsu- og almannaverk, felagsskapir og mentan verða løgd saman, høvdu hesir bólkar 1319 mió. kr. í lønarútgjalding í 1989 og 1520 mió. kr. í 1999. Hetta svarar til 29,75% av samlaðu lønarútgjaldingunum í 1989 og 34,3% í 1999. At tað almenna hevur økt um sín part av teimum samlaðu lønarútgjaldingunum við 4,6% ella ein hækking 15,2% merkir, at aðrar vinnugreinir hava goldið mundandi minni í lønarútgjaldingunum í 1999 í mun til 1989, verður staðfest í tíðindaskrivinum.

### Byggivinnan afturgongd

Tann størsta afturgongdin, sambært hesum yvirliti, er á byggivirkseminum. Í 1989 hevði byggivirksemið 8,5% av teimum samlaðu lønarútgjaldingunum. Í 1999 4,9%. Hetta vísir greitt, at byggivinnan ikki er komin fyri seg aftur eftir kreppuna, og at økta virksemi í samfelagnum ikki stavar frá byggivinnuni. Í 1989 vóru lønarútgjaldingarnar viðvíkjandi byggivirkseminum 379 mió. kr. og í 1999 — 219 mió. kr. Hetta er ein afturgongd uppá 42,2%.

Og greið lækking sæst eisini viðvíkjandi fiskavøruídnaðinum, sum í 1989 rindaði 9% av teimum samlaðu lønarútgjaldingunum í mun til 7% í 1999. Í tølum svarar hetta til 401 mió. kr. í 1989 og 309 mió. kr. í 1999. Fyri ein part skyldast hetta, at avreiðingarnar til føroysk fiskavirki eru lækkaður úr 109.612 tonsum í 1989 til 90.740 tons í 1999. Hetta er ein lækking uppá 17,2%. Samstundis er fiskavøruídnaðurin vorðin effektivari, og tí framleiðir meira í mun til goldnan lønartíma. Kappingin um rávøruna er hørð, samstundis sum rávøruprísurin er høgur, skrivar Vinnuhúsið.

– Innan ali- og kryvjivirki er eisini ein týðilig effektivisering farin fram. Lønarútgjaldingarnar vóru í 1989 — 74 mió. kr. og 111 mió. kr. í 1999. Hetta er ein vøkstur á 50%. Samstundis er framleiðslan farin úr 8.088 tonsum í 1989 til 39.536 tons í 1999. Hetta svarar til ein vøkstur á 389%. Produktiviteturin í mun til lønartíman er soleiðis øktur munandi.

### Fíggjarpolitikkur

Og at enda skrivar Vinnuhúsið, at fleiri tilmælir hava verið um at tað almenna skal føra ein stramman fíggjarpolitikk, og serliga verður víst á, at tað almenna eigur at avmarkað sínar íløgur. Men hesi tøl vísa, at tað ikki er byggivirksemi, sum hevur skapt tað økta virksemi í landinum, men heldur almennar rakstrarútreiðslur og lønarútgjaldingarnar innan fiskiskap.

– Tað sæst eisini týðiligt á tí føroyska samfelagnum at politikarar hava valt ikki at gera íløgur og heldur varðveita og hækka rakstrarútreiðslurnar. Hesin politikkur sæst aftur í dag á til dømis einum samferðsluskervi, sum er niðurslitið.

## Konsertir við Daisy Johannesen og Elsu Súsonnu Dalsgarð

*Vikuskiftið 15. og 16. apríl verða konsertir við Daisy Johannesen og Elsu Súsonnu Dalsgarð*

Framførd verða verk eftir Giovanni Pergolesi og Johann Sebastian Bach

Leygardagin og pálmasunnudag, 15. og 16. apríl, verða konsertir í Klaksvík, Gøtu og í Havn við sopransangarinnuni Daisy Johannesen og altsangarinnuni Elsu Súsonnu Dalsgarð. Tær fara at framføra sakralt verk eftir barokktónaskaldinum Giovanni Pergolesi. Hesin var føddur í Jesi, ein lítil bygd í nánd av Napoli í 1710, og gjørdist hann heilt ungur kapelmeistari og urguleikari við kgl. kapellið í Napoli. Men honum varð ikki langt lív lagað; longu í 1738, bert 28 ára gamal andaðist hann av tuberklasjúku. Men hóast stutta lívstíð, so fekk hann avrikað nógv. Ikki færri enn 15 operaverk, 12 kantatur, 30 triosonatur, sinfoniir og konsertir, 6 messur og rúgvu av øðrum kirkjuligum verkum, legði hann úr hondum. Áðrenn hann doyði í einum kapucinarakleystri, hevði hann skrivað týdningarmesta og helst vakrasta verk sítt, „Stabat Mater“ (Guðs móðir stóð við krossin), fyri tvær kvinnurøddir, strúkarar og cembalo/urgu, og er tað júst hetta verkið, tær báðar Daisy og Elsa Súsanna, fara at framføra. Konsertirnar verða soleiðis, at leygardagin verður framførsla í Christianskirkjuni í Klaksvík, og sunnudagin í Gøru kirkju og ED Vesturkirkjuni í Havn. Umframt „Stabat Mater“, verður á skránni eisini Brandenburgkonsert nr 3 av Johann Sebastian Bach. Hetta er soloverk fyri 9 strúkarar, og eru tað limir úr Føroya Symfoniorkestri, sum koma at framføra verkið, umframt at teir eisini spæla undir til verkið eftir Pergolesi. Nær á degnum konsertirnar vera, verður lýst seinni.

Viðmerking:

## Vidmerking til grein í Sosialinum "Loynivirksemi", tann 4. mars 2000

For det første skal der slås fast, at man har arbejdet med strukturen i færøernes centraladministration i mange, mange år. Allerede iden 20. Marts 1989 brugte færøernes centraladministration et ukendt antal millioner på konsulenthjelp på at komme med forslag til strukturændringer. Den foreslåede struktur dengang, blev aldrig implementeret. Ikke nok med det. Allerede i 1979, blev der af Landsstyret udarbejdet en rapport, hvis kommisorium var at udarbejde et diskussionoplæg til organisationsændringer.

De historisk betingede problemer i færøsk forvaltning havde været, at der var i realiteten ingen centraladministration. Man havde et lille sektretariat bestående af et lille antal uddannede medarbejdere ca.8-10, der havde mere eller mindre direkte adgang til landsstyremedlemmerne. Man havde et kollegialstyre, som efter min bedste overbevisning kan sammenlignes med et dansk eller grønlandsk sogneråd med særlige beføjelser og novicer på udenrigsområdet. Man havde f. eks. Ingen indenrigspolitisk administration, ingen kommunal styring. Planlægning og styring af anlæg og infrastruktur blev styret af en embedsmand i et direktorat og et parlamentarisk udvalg. Dvs. Uden politisk administrativ styring fra centraladministrationens side.

Helt op til 1993, var det faktisk kun fiskeriafdelingen i færøernes hjemmestyrres sekretariat og lovkontoret, der fungerede efter hensigten.

Man skal dog se udviklingen i et historisk lys. Ved hjemmestyrets oprettelse 1. April 1948 blev lagtingskontoret afløst af landsskrivstovan, og har til 1987 været sekretariat for både lagting og landsstyre. I 1987 blev lagtingskontoret genoprettet for at aflaste Hjemmestyrets sekretariat.

Det som har kendetegnet landsskrivstovan til 1987 er, at det har fungeret som sekretariat og tjent alle landsstyrets medlemmer med en kontorchef og senere med to kontorchefer.

Det som Finn Normann Christensen fikk hjemmel eller kommissorium til at gennemføre sammen med relevante interessenter var at få indført en centraladministration, som kunne varetage "normale" departementale opgaver. Hvis FNC ikke var blevet anmodet om at gøre dette, i den svære forfatningsmæssige sitiuation Færøerne var i på dette tidspunkt, ville det aldrig været blevet til noget.

Om det er bedre nu eller før, det er en smagssag. Men det er klart, at man har fået flere forvaltningsmæssige områder at arbejde med og som jeg mener er særdeles
væsentlige. F.eks. udenrigsområdet, olieforvaltningsområdet og socialområdet.

**Vinarligast**
**Rói Eliasen, cand.mag**
**Erhvervschef**
**Sisimiut, Grønland**